DAGSINS MEINING

Virðing fyri løgmansembæti uppá spæl

Málið um landsantikvarin er vorðið til eitt opið stríð millum løgmann og varaløgmann. Løgmaður, ið hevur ábyrðina av, at landsstýrismenn fyrisita sítt øki á skilagóðan og fullgóðan hátt, kom til, at Annlis Bjarkhamar hevur ikki gjørt tað, meðan varaløgmaður, ið eisini er løgmálaráðharri og mentanmálaráðharri nú hevur staðfest, at einki skeivt er farið fram. Hann staðfestir avgerðina hjá fráfarna mentamálaráðharranum, og tað merkir, at hann gongur beint ímóti tí, sum løgmaður við landsins ovastu embætisfólkum hevur kannað og komin til eina niðurstøðu í.

Hetta er ein óhaldbar støða. Her stendur orð móti orði millum tvey av landsins hægstu fólkum. Almenningurin hevur krav upp at vita, hvør hevur rætt í hesum málinum. Tað er ikki nokk, at løgmaður bara tekur til eftirtektar tað Høgni Hoydal nú hevur gjørt. Løgmaður má út og fortelja Føroya fólki, hví løgmaður hevur rætt. Tað skyldar hann løgmansembætinum og tess tign.

Løgmaður hevur viðgjørt hetta sum eina politiska sak, har m.a. setanarpolitikkurin er brotin. Løgmaður ger hetta, hevur hann sjálvur sagt, tí tað er altumráðandi at varðveita álitið hjÁ almenninginum á fyrisitingina. Varaløgmaður tosar um jura og sigur, at eingin lóg er brotin. Tað hevur heldur eingin pástaðið eiheldur løgmaður. Løgmaður hevur afturímóti kraftiga meldað út, at starvsfólkapolitikkurin skal haldast. Hesin er brotin. Høgni Hoydal kemur aftur og sigur, at tað er hann ikki. Tosað verður um at fáa umboðsmannin uppí, men hvat skal hann taka støðu til, tá eingin lóg er brotin og hann neyvan fer inn í ta politisku viðgerðina (tvs. brot á starvssetanarpolitikkin) av málinum, sum er kjarnin.

Sambart ÚF í vikuni segði løgmaður, at hann roknaði við, at Høgni Hoydal tók málið upp. Tað kundi so bara skiljast sum, at hann ógildaði setanina, hvat man eisini má rokna við, at løgmaður hevur sagt honum og ætlað, tá hann góðtók áheitanina frá Høgna Hoydal um at taka ábyrgdina av sessinum. Nú varaløgmaður ger beint tað øvugta ræður fullkomin ruðuleiki.

Neyvan er nakar ivi um, at gerðin hjá varaløgmanni er vend móti løgmanni, sum tí ikki kann sita hendur í favn og lata hetta fara aftur við borðinum. At løgmaður ikki letst um vón og tykist hava tjúkka húð er so eitt. Men hann umsitur landsins mest tignarliga sess, og Føroya fólk kann ikki liva við, at varaløgmaður, løgmálaráðharrin og mentamálaráðharrin á henda hátt sáar iva og misálit á henda sess. Vil løgmaður ikki taka avleiðingina av støðutakanini hjá nýggja mentamálaráðharranum, fáa hann til at broyta støðu og ógilda setanina ella siga hann upp ella siga samstarvið upp, so má hann út at fortelja Føroya fólki hví og samtíðis greina út, hví hann og hansara umsiting hava rætt í síni niðurstøðu.

Løgmansembætið kann ikki liva við hesum. Tað er í roynd og veru trúvirðið hjá løgmansembætinum,, sum stendur uppá spæl. Næsti maður løgmans er farin út alment og tileinkisgjørt eina ta mest prinsipiellu avgerð, sum løgmaður hevur tikið, og sum nú bæði embæti og persónur koma at líða undir og vera fyri varandi skaða, verður hetta seinasta orðið í málinum. Fer hetta afturvið borðinum er almenni setanarpolitikkurin ikki verdur tað pappír hann er skrivaður á.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Almanna-og heilsuskúlin á Tvøroyri

Finnleif Guttesen
Tvøroyri

Tað er undrunarvert, at løgtingsmennirnir úr Suðuroy eru púra kúrrir, meðan løgtingskvinnan úr Norðoyggjum Mamy Dahl Sørensen ger vart við umstøðurnar hjá hesum skúla.

Tingkvinnan úr Norðoyggjum spyr hvørjar ætlanir landstýrismaðurin hevur við almanna- og heilsuskúlanum á Tvøroyri.

Hetta er ein viðkomandi spurningur, sum hevur stóran áhuga og týdning fyri øll sum skulu brúka skúlan bæði næmingar og lærarar. Skúlin hevur eisini stóran týdning fyri eldraøkið, tí tað er altíð ein fyrimunur, at tey sum eru um tey eldru hava so góða útbúgving sum gjørligt.

Verandi hølisviðurskifti á almanna-og heilsuskúlanum

Skúlin húsast í einum leigaðum húsum, sum Tvøroyrar kommuna gjørdi brúkilig fyri eina millión krónur. Skúlin leigar eisini nøkur hølir í einum privatbygningi og til seinast leigar skúlin nú eisini musikskúlastovuna í Tvøroyrar skúla.

Hetta er sjálvsagt ikki ein loysn sum kann góðtakast og mugu nøktandi hølisviðurskifti tí koma uppá pláss sum skjótast.

Líkjast óhugnaliga nógv

Hølisviðurskiftini á almanna-og heilsuskúlanum líkjast óhugnaliga nógv viðurskiftunum á fiskivinnuskúlanum í Vestmanna og øll vita hvussu nógv ár hetta hevur staði við. Báðir skúlanir hava alstóran týdning fyri føroyingar, fiskivinnuskúlin fyri at vit kunnu fáa mest møguligt burtur úr okkara primervinnu og almanna-og heilsuskúlin fyri at tey, sum eru um okkara eldru hava so góða útbúgving sum gjørligt.

Ein landsuppgáva

Tvøroyrar kommuna hevur gjørt hvat hon kann, bæði fyri at skaffa hølir til sjálvan skúlan og til næmingarnar sum koma á skúlan. Somuleiðis kann kommunan bjóða barnaansing eftir vanligum treytum, til teir næmingar sum hava børn við.

At syrgja fyri nøktandi hølisviðurskiftum er ein landsuppgáva, ikki ein kommunal uppgáva, men trupulleikin hevur alla tíðina verið og er, at landsmynduleikarnir ikki vilja geva skúlanum nøktandi sømdir. Tí er tað alneyðugt, at tingfólk vísa dirvi og geva hesum skúlum góðar umstøður.

Tingborg til 32 fólkavaldar ella skúlar til hundra tals næmingar

Teir fólkavaldu meta ikki, at hølisviðurskiftini hjá hesum skúlum hava tann stóra týdning, tí teir vilja heldur at brúka 100 millionir uppá egnu hølisviðurskifti.

Havi nú dirvi fyri einaferð skyld, takið eina støðu sum er virðilig, steðga ørvitisprojektinum við tinghúsinum og brúki peningin til neyðugar skúlar og eldraøkið.

Fundir hjá Ráðnum fyri brekað

TÍÐINDASKRIV

Ráðið fyri brekað sendir í framtíðini út tíðindaskriv eftir, at ráðið hevur hildið fund. Hetta verður gjørt fyri at kunna almenningin um arbeiði og ætlanir hjá ráðnum.

Seinasti ráðsfundur varð hildin 27. februar í Klaksvík, har býráðsformaðurin Steinbjørn Jacobsen, ið eisini er ráðslimur, var vertur.

Vitjað var á bústovninum fyri børn og ung, sum eru autistar. Her fingu ráðslimirnir innlit í tað miðvísa arbeiðið, sum verður gjørt fyri at skapa eina góða tilveru við persónligari menning fyri búfólkið á hesum bústovni.

Ráðið fyri brekað vitjaði eisini teir nýggju og stásiligu bygningarnar við sambýli og íbúðum fyri eldri, sum í næstum lata dyrnar upp.

Norðoyingar kunnu saman við landsmyndugleikunum vera stoltir av hesum tiltaki. Í øðrum portum av landinum kunnu tey óivað fáa íblástur frá hesum búmøguleikum fyri eldri.

Gott var at síggja, at atkomumøguleikarnir til býráðshúsið, har fundurin varð hildin, vóru góðir, og at lyfta var til ovaru hæddirnar.

Á fundinum varð m.a. umrøtt, hvørji høvuðsmál Ráðið fyri brekað skal arbeiða við í hesum árinum:

- Ráðið ger myndugleikarnar varar við spurningin um fyritiðarpensjón. Her verður serliga hugsað um trupulleikarnar hjá teimum, sum fáa lægstu pensjón
- Ráðið heitir á myndugleikarnar um at útvega møguleikar fyri figging til ódyrar og góðar leigu- og eigaraíbúðir til fólk við breki. Hervið verður møguleiki teirra at skapa eina sjálvstøðuga tilveru øktur
- Ráðið tekur upp spurningin um, hvørt tað er rætt og gagnligt, at serlig lóg ella serligar reglur viðvíkjandi brekaðum umframt Fyrimyndarreglur ST´s skulu gerast í Føroyum. Við hesum verður hugsað um, at atlit til rættindi hjá fólki, ið bera brek, verða viðgjørd í grundlógarhøpi

Harumframt fer Ráðið at fylgja tí framhaldandi arbeiðinum at leggja eldraøkið til kommunurnar at umsita, og arbeiðinum at smíða lóg um barnavernd, sum eisini hevur týdning fyri fólk við breki.

Sum evni til umhugsanar kann nevnast, at eisini hesuferð mátti tann ráðslimur, sum situr í koyristóli, sita eftir á bildekkinum, tá ið farið varð til Klaksvíkar! Tunnilin til Klaksvíkar verður ein fyrimunur, eisini fyri rørslutarnað.

Næsti fundurin hjá Ráðnum fyri brekað verður fríggjadagin 4. apríl í Vestmanna, har vit eisini fara at hyggja at, hvussu viðurskiftini eru hjá fólki við breki.

Tommy Petersen,
formaður í Ráðnum fyri brekað

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstoðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-friggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

At velja heimsmál

Ivan Eginsson

Nú er tíðin komin hjá komandi næmingum á Studentaskúlanum og HF-skeiðunum í Hoydølum at velja nøkur av teimum fakunum, ið teir fara at hava á skúlanum. Hjá teimum málsligu næmingunum stendur valið millum eitt av trimum málumum, ið ikki hoyra til tann heimliga germanska málbólkin (føroyskt, hini norðurlendsku málini, enskt, týskt).

Tað verður ofta sagt, at føroyingar eru so fámentir. Men hesin lítilleikin kann vendast til nakað positivt: hini duga ikki føroyskt, so læra føroyingar bara málini hjá hinum.

Tann føroyski studentaskúlin er so væl fyri, at hann kann bjóða bæði fransk, spansk og russiskt sum triðja heimsmál aftan á enskt og týskt.

Tey seinastu árini hevur gongdin verið tann, at trupult er at fáa fleiri næmingar til at velja russiskt. Samstundis eru tey sera nógv, ið heldur taka spanskt. Eftir mínum tykki er tað eitt sindur óheppið fyri tann føroyska skúlan og samfelagið sum heild.

Í heimsparti okkara tosa tey spanskt bara í einum landi, Spania. Fólkatalið har liggur um 40.000.000 fólk. Harav hava nógv teirra onnur mál, enn spanskt, til móðurmál (baskiskt, katalanskt). Franskt tosa tey í Fraklandi og þortum av Belgia og Sveis (umleið 80.000.000 fólk).

Tað er ikki ætlanin at niðurgera spanskt og franskt í hesi greinini. Tvørturímóti. Tað er frálíkt, at føroyingar kunnu hava hesi bæði málini á studentastigi. Men samstundis tykist russiskt, ið 150.000.000 fólk bara í Russlandi, plus 200.000.000 fólk í øðrum eysturevropeiskum londum tosa, at vera dottið burturímillum á føroyskum studentaskúla.

Tað eru ivaleyst fleiri orsøkir fyri tí. Politiska fortið Russlands og atskiljandi negativur tíðindaflutningur eystanifrá, eins og luftfalsliga torføra málæran, gera sítt til, at ein komandi føroyskur studentaskúlanæmingur velur ein "tryggari" veg við sponskum ella fronskum.

Eg fari ikki her at umrøða tað bókmentaliga ríkidømið, ið tað russiska málið eigur. Tað eru heldur spennandi arbeiðsmøguleikar, sum kunnleikin til russiskt hevur við sær. Russland hevur meira handilssamstarv við Føroyar, t.d. á fiskiveiðuøkinum, enn Frakland ella Spania, og hetta samstarvið bara fer at økjast við einum møguligum fríhandilssáttmala Føroya og Russlands ímillum.

Mær vitandi eru bara tríggir núlivandi persónar av føroyskum uppruna, ið nakrantíð hava lokið cand. mag. prógv. í russiskum. Ein er komin í eftirlønaraldurin. Ein er sera væl umtøktur lærari í týskum og russiskum í Hoydølum, men hann fellur tíverri fyri aldurmarkinum í 2005. Yngstur av teimum verður 62 í ár og er búsetandi uttanlands. Hvussu er so við teimum yngri ættarliðunum?

Um nøkur ár fer tað ikki at gagna tí føroyska samfelagnum, at eiga tjúgu ella fleiri virkandi "akademikarar" í sponskum og fronskum, og ongan í russiskum. Russland, umframt av vera eitt risastórt land, er ein av grannunum og góðu samstarvsfeløgunum hjá Føroyum. Tí átti hugburðurin viðvíkjandi russiskum at verið broyttur á føroyskum studentaskúla. Meira javnvág eigur at koma í talið á teimum, ið velja triðja heimsmál - spanskt, franskt ella russiskt. Tað er yvirhøvur ikki møguligt at velja russiskt á Kambsdali ella í Vági. Hoydalar er einasta staðið, har undirvíst verður í hesum vakra, ríka og, ikki minst, týdningarmikla máli. Tað hevði tað verið stórt spell, um russiskundirvisingin í Føroyum fór fyri skeytið, orsakað av manglandi áhuga millum tey ungu.

Skotlandstúrur fyri 20 kr

– á Torginum í SMS leygardagin

TOMBOLA
Tíðindaskriv

Fríggjadagin og leygardagin – í dag - fer Vestmanna Kirkjukór at hava stórt tombola á Torginum í SMS. Millum mongu vinningarnar verða m.a. laksur, ræstur fiskur, kaffi, kips, sodavatn, bollar, køkur, 100 páskaregg og mangt annað.

Leygardagin kl. 13 fer kórið at hava eina meksikanska uppboðsølu á Torginum, har er ein ferðaseðil til Skot-lands frá Atlantic Airways verður burturlutaður.

Meksikanska uppboðsølan gongur fyri seg soleiðis, at tey vitjandi í SMS leygardagin kunnu bjóða uppá ferðaseðilin. Hvørt boð kostar 20 krónur, sum verður latið uppboðshaldaranum. Bjóða uppá ferðina inntil ikki fleiri boð koma. Tann ið eigur síðsta boðið, vinnur skotlandsferðina við Atlantic Airways.

Vestmanna Kirkjukór er eitt sera virkið kór. Umframt at syngja, undirhalda tey eisini við sjónleiki. Kórið, sum telur 45 gentur og kvinnur, syngja til ymisk høvi, eitt nú til høgtíðir, so sum jól, til páskar, og eisini til tiltøk eftir áheitan. -Seinasta tiltakið kórið luttók í, var ísambandi við eitt hugnakvøld fyri bindiklubbar í Vestmanna. Har undirhelt kórið við sangi og undirhaldi. Tann 19. mars skulu tey aftur á pallin, hesaferð ísambandi við hugnalotu hjá pensiónistunum í Vestmanna.

Endamálið við tiltakinum á Torginum í SMS er fyri at savna pening til ein túr til Álands í døgunum 1. til 14. juli í ár. Á Álandi skulu tey m.a. syngja í Jomala kirkjuni, St.Gøran kirkjuni, og á Fugloynni, sum ljóðar ógvuliga føroykst. Á heimferðini gongur leiðin til Keypmannahavnar, har kórið m.a. syngur í Sámuelskirkjuni.

Eru tað vestmenningar, í bygd og í bý, sum vilja lata ein vinning til tiltakið, so kann ringast á telefon 221577, 424192 ella 424614.

Hjartasuff

Hans J. M. Garðalíð

Nakað er nú fráliðið, síðani tað stóð at lesa í bløðunum, at Café Blákross ikki fekk meira pening, ja, so mátti lukka.

Hetta bleiv so fingið upp á pláss. Tórshavnar býráð tók sær av hesum. Hettar tykir mongum sum undarligt, tí café'in skuldi kunna forrenta seg sjálva, um hon varð betri umsitin, og av kvalifiseraðum fólki.

Nakað seinni er at lesa í einum Blákrossblað, har leiðarin á café'ini sáðar illgras, og kastar grugg og svans eftir ónevndum frívilligum felagsskapi (øll vita vit, hvør hann er).

Dári tín, sær flísina í eyga bróðir tíns, og ikki bjálkan í tínum egna.

Dekan settur, um ikki leiðarin fyri Café Blákross ikki aftur nú var at síggja í sjónvarpinum, sá ógvuliga forvirraður út, ósikkur, leitaði eftir orðinum, ópresentabul ilatin, men aftur nú prøvar hann at sáa illgras um áðurnevnda ónevnda felagsskap.

Tað má nú vera upp á tíðina, at hesin lúsagtigi framferðarháttur av leiðaranum verður átalaður.

Lat tað verða gjørt púra greitt, at leiðari + aðalstjóri + skrivari + prestur er ikki nokk til at koma upp á knøini á leiðaranum á tí ónevnda felagsskapi, sum tit kasta/sáa iva og grugg um. Nei, tit eru ikki verdir, enn minni tit tora at stíga í inniskógvar hansara.

Café Blákross átti heldur at tikið við læru frá hesum manni, og heldur biðið hann um hjálp og ráð, táið á stóð.

Vónandi sá Heilsufrøðiliga Starvsstovan útsendilsið, hvar leiðarin við handalag sum krabbi og elegansu sum kúgv tilbereiddi og serveraði eina pizza, vásaklæddur og við tvivlsamari hygieinu. Hetta er so langt úti og óforsvarligt, at leiðarin átti at verið uppsagdur upp á standandi fót.

Nú hevur leiðarin eisini, sum rosinan í pylsuendanum, tveitt á gøtuna eina 70 ára gamla kvinnu. Grundgevingin er 1 tóm fløska, havi eg fingið fortalt, sum skuldi nýtast til lampu.

Hvussu visti leiðarin um hesa tómu fløsku, jú hann hevði læst seg inn á kamarið hjá kvinnuni, ímeðan hon var burturstødd á aðrari oyggj.

Er hetta ikki ein kriminell handling, har politiið skuldi tikið sær av hesum? Leiðarin hevur framt hetta brot meira enn einaferð.

Samanumtikið kann eg bara konstatera, at eg ónatúrliga illani – fyri ikki at siga slett og aldeilis ikki – vil vera við til at figgja nakað sum helst, har ein inhabilur ørvitisknokkur gongur runt í øðini og brølar »at so leingi, sum eg eri skipari, skal eg ráða fyri borgum«.

Og bara slett ikki tá ið viðkomandi er so perufullur í sjálvsrættvísi, at hann uttan fyrilit læsir seg inn á kømurni hjá íbúgvunum.

Vónandi fer Tórshavnar Kommuna at kanna viðurskiftini á Café Blákross og finna útav, um stuðulin, sum latin verður, er til gagns ella »um hann eins væl kundi verið brendur ella bert tveittur burtur«. Eitt slíkt Sodoma má ikki stuðlast við almennum midlum, fyrr enn øll/allir, sum í dag hava nakað sum helst við leiðslu og rakstur at gera, eru uppsagdir permanent, og ongantíð koma aftur, eisini nevndin aftanfyri, tí hon hevur góðtikið direkta ella indirekta tað sum er farið fram.